er okkara hægsta mál at vøran skal síggja gott út og at góðska skal vera í.

– Og tað skal als ikki verða soleiðis, at fólk skulu snerkja at vøruni, tí hon ikki er nýggj. Hon ER nýggj og hon SKAL eisini vera nýggj!, sigur Jógvan Høj.

### Fryst fesk

Men tað at vørurnar verða frystar, er tað ikki júst tí at fiskurin er um at vera ov gamal?

- Nei, sigur Jógvan Høj. Tað er ikki so!

Teir frysta ikki vøruna, tí hon er við at verða ov gomul, og at hon tí má í frystaran sum skjótast, áðrenn hon spillist. Sum teir siga: Vit frysta tað heilt einfalt, tí at vøran skal vera fesk, tá brúkarin fær hana.

Soleiðis kann brúkarin til eina og hvørja tíð vera vísur í, at tann fiskurin tey keypa frá NORÐFRA er feskur fiskur, og sum aftur er fram-leiddur feskur og síðani er frystur sum fesk framleiðsla.

– Tí er tað, sum vit egentliga gera, sera einfalt: Vit hava heimsins bestu rávøru beint innanfyri hurðina, og at tað tí er óneyðugt hjá føroyingum at keypa útlendsk merki - og enntá merki, sum als ikki kunnu sammetast við okkara í smakki.

– Hinvegin so er ikki vist, at okkara framleiðsla er tann bíligasta. Men hon er í øllum førum tann besta, slær Jógvan Høj fast.

### Einki til spillis

Ein viðkomandi spurningur í hesum máli er, hví vørurnar hjá NORÐFRA eru so væl umtóktar manna millum, hóast tær kanska ikki teljast millum tær bíligastu?

Tann spurningin hevur Jógvan Høj eisini eina frágreiðing um:

– Tað er allatíðina hetta sama, - at vera til fyri brúkaran: Ætlar tú tær at gera døgurða, so er okkara vøra soleiðis, at tú t.d. kanst taka eitt einstakt flak burtur úr pakkanum. Men tú kanst eisini taka fleiri, um tú brádliga hevur brúk fyri tí. Á henda hátt fer einki til spillis.

Teir hava eisini valt ein pakkihátt, sum er ódýrur, samstundis sum hann goymir vøruna væl.

– Ein frystiboks er í hvørjum húsi í Føroyum, men tað er ikki so í grannalondum okkara. So orsøkin til at vørurnar eru so væl umtóktar her á landi kemur av, at fólk hava eitt val: Kemur onkur aftrat til døgurða, so er einfalt at fara í boksina og taka fleiri fløk upp aftrat. Og 10 min seinni eru tey klár at seta á borðið.

– Soleiðis, sum vit hava gjørt fiskin er hann skjótari at gera til, enn hvat tað tekur at kóka eplini. Tað er ikki neyðugt at hugsa um fiskin kvøldið fyri, tí hann er klárur at leggja á pannuna, sigur Jógvan.

Og líkt er til, at hetta er í øllum førum eitt av tí, sum ger at fólki dámar væl framleiðslurnar frá NORÐFRA.





*– Tað verður sagt, at fiskurin undir Føroyum er ogn hjá Føroya fólki. Men í løtuni sær út til at tað bara eru fiskimenn sum eiga hann, sigur Jógvan Høj, stjóri á NORÐFRA í Norðdepli*

# – Ein skomm at fiskur bara fer av landinum

**- Eitt land sum alla tíðina flytir út rávøru og sum ikki kann framleiða sína egnu, kemur í sama bólk sum eitt menningarland, sum vit kenna so væl frá t.d. Afrika. Eitt slíkt land kemur ikki úr stað, sigur NORÐFRA-stjórin**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*

**Norðdepil:** Hyggur ein eftir keyparunum hjá NORÐFRA, so sæst greitt, at eini 80 % av allari framleiðsluni fara til stóra granna okkara fyri vestan.

Ein partur fer eisini til Onglands, Danmarkar og Svøríkis, men nógv tann størsti parturin altso til USA.

At eitt so lítið virki sum NORÐFRA í Norðdepli megnar at hava samband við tann amerikanska marknaðin kemur einamest av, at fiskavørurnar úr Norðdepli verða seldar gjøgnum føroyskar fiskaseljarar.

Hinvegin vísir tað seg trupult at halda fast við tann amerikanska marknaðin, tí dollarin er so nógv viknaður tey seinnu árini. Tá hann var hægstur fyri eini trimum árum síðani var hann uppi á 8,74 kr., meðan hann í dag er komin heilt niður á 5,72 kr., sum svarar til eina lækking millum 35 og 40 %.

Samstundis er prísurin á fiski fallin eitt sindur, men ikki alla tíðina. Fyri tveimum vikum síðani var hann á teirri leguni, hann var á fyri trimum árum síðani.

Tað vil aftur siga, at hýsa, sum virkið helst ikki skuldi latið meiri fyri enn 7 til 8 kr. fyri kilo, hon kostaði fyri tveimum síðani heilar 14 kr. fyri kilo fyri tveimum vikum síðani.

### Eingin torir at gera nakað

– Tað er eisini í hesum sambandi at eg kundi hugsað mær at sagt við politikkararnar, at fiskurin – og her serliga hýsan - ikki eigur at fara heilur av landinum. Men tað er helst eingin politiskur vilji at gera nakað munagott við tað.

– Nú hoyri eg eisini onkran teirra tosa um, at alt skal vera frítt. Men til hetta vil eg siga, at eitt land sum allatíðina flytir út rávøru og sum ikki kann framleiða sína egnu, kemur í sama bólk sum eitt menningarland, sum vit kenna so væl frá t.d. Afrika. Eitt slíkt land kemur ikki úr stað.

– At hýsa og onnur fiskasløg fara óviðgjørd av landinum – tað haldi eg simpelthen er skomm fyri Føroyar, sigur hann avgjørdur.

Onkur hevur roynt at skylda uppá kinesarar og aðrar vegir. Men samstundis vita vit, at íslendingar hava sett í gildi ráfiskasteðg, og tað hevur aftur við sær at prísurin á hýsuni er høgur í løtuni.

– Góvu vit ikki bretum okkara heila fisk, men seldu teimum fløk ístaðin, so høvdu teir heilt vist keypt fløkini. Og so hevði okkara prísur eisini farið upp.

### Eingi fakfeløg

Jógvan Høj heldur, at tað er í lagi at hava ein frían marknað, men so eiga politikkararnir eisini at tora at løggeva soleiðis, at fiskurin verður verandi í Føroyum.

– Tí undrar tað meg at fakfeløgini ikki hava gjørt vart við hetta, ella hava gjørt vrøvl um støðuna. Serliga aktuelt hevur tað verið í ár, tá so lítið arbeiði hevur verið. Og sum tað sær út nú, so er talan um eina útpíning av flakavirkjunum. Og tí er ikki leingi aftrat, inntil einki flakavirki er eftir í landinum, um ikki broyting kemur í.

– Tað verður sagt, at fiskurin undir Føroyum er ogn hjá Føroya fólki. Men í løtuni sær út til at tað bara eru fiskimenn sum eiga hann. Tá ið onkur uppi á landi sigur okkurt við politikkararnar, so skal tað kannast og so framvegis. Men sigur ein fiskimaður nakað, so spyrja teir bara hvat – og so gera teir tað beinanvegin.

– Tað er næstan so, at um ein teirra biður ein politikkara um at leypa á sjógv, so hevði hann gjørt tað beinanvegin. Hann hevði bara spurt, hvussu langt hann skuldi leypa.

– Hetta ljóðar kanska sum grenj, men tað er tað ikki bara, tí tað er soleiðis, eg upplivi støðuna beint nú. Men hetta er ein álvarsom støða, sum minnir um hana í 1992, tá tey flestu virkini vóru stongd eitt skifti.

– Tá fór fiskaprísurin eisini niður í botn. Tí tað vita teir eisini í Onglandi – at er eingin annar møguleiki at sleppa av við fiskin, so koyra teir bara prísin niður, tí so fáa teir hann kortini, sigur Jógvan Høj.

**Arbeiðsfólk á NORÐFRA**

Í tveimum seinni bløðum fara vit at hitta trý av arbeiðsfólkunum á virkinum – tvær kvinnur og ein mann.